

www.oljan.fo

**Jan Müller** 07 - 08 - 2013

# Loftvegis samband til Skotland fortreyt fyri samvinnu

Johan Dahl er ein landsstýrismaður, sum hevur nógv jørn í eldinum, nú samfelagið skjótt er við at leggja summarfrítíðina aftur um seg. Sum landsstýrismaður í vinnumálum eru boð eftir honum nógva staðni. Eitt nú tá tað snýr seg um at byggja brýr og knýta bond til næstu grannar okkara. Nú um dagararnar vitjaði tingmaðurin fyri Hebridurnar í bretska Undirhúsinum, Angus MacNeil, í Føroyum. Hann er eisini formaður í Føroyanevndini í Undirhúsinum og hevur tí ein týðandi leiklut í sambandi við framtíðar samstarv millum Føroyar og Bretland/Skotland. Boðskapurin í samrøðu oljan.fo hevði við hann var, hvussu náttúrligt tað er við tættari samstarvi millum Skotland og Føroyar. Hesum tekur Johan Dahl, olju- og vinnumálaráðharri fult undir við. Hann sigur við oljan.fo, at nú skotar og oyggjabúgvarnir fyri sunnan hava so drúgvar royndir á oljuøkinum og nú føroyingar síggja fram til eina komandi oljuvinnu á Atlantsmótinum, er so avgjørt neyðugt við tættari samstarvi. Men fortreytin fyri slíkum samstarvi er betri samband millum londini. Vit hava jú havt bæði flog- og skipasamband til ymisk støð í Skotlandi og Hetlandi. Nógv er hent síðani hesi samferðslusambond vórðu avtikin, og fortreytin fyri, at vit í dag og í framtíðini kunna menna samvinnuna er eitt loftvegis samband. Tað vil bæði gagna ferðavinnu, handilsvinnu og ikki minst eini komandi oljuvinnu, sigur Johan Dahl, sum sær fyri sær, at Føroyar og Skotland í framtíðini heilt náttúrliga fara at verða tættari knýtt at hvørjum øðrum, nú vit eru næstir grannar. (Lesið eisini samrøðu við Johan Dahl í komandi grein um oljuútlitini fyri Føroyar)